# Vatntátturin

1.
Av øllum tí góða Várharra gav
ei nøkur gáva var betri
enn vatnið sum rennur frá fjalli í hav
bæði á sumri og vetri
til gagns fyri menniskja og dýr
men ei fyri fólkið á Sandi býr.

*Niðurlag:*
*Alt í Føroyum sum vakurt er og gott*
*kemur ikki í henda tátt*

2.
Tí illa tey vatnrør teir hava røkt
teir stavnar ið bygdini stýra
teir neyðars menn ið hava sett seg ov høgt
nú blóta og svørja so dýra
ei fæst ein vatndropi nakran dag
nei her má koma eitt annað lag

3.
Nú eiga vit ikki meira tol
nú brunnar í bønum teir gera
og skjótt verður bygdin tey beru hol
men ov lítið vatn tó man vera.
Eitt Sodoma verður Sandsbygd tá
hoyr bert hvat ið Ísakur segði frá

4.
Ja vatnið tað klára eg haldi meg til
tað best er tá eg var tystur
men nú fer ei longur at bera til
tann seinasti dropin er mistur
og tí má eg brúka sprutt og katt
ja saniliga nú er so illa statt

5.
Mítt býtta beist at eg fekk mær kúgv
av tosta hon sáran man belja
ein Carlsberg hon drekkur við góðari trúgv
men mjólkina ei eg kann selja
og ryssan í øðini spelar avstað
tá hon fær ein hálvpott av sama slag

6.
Eg døgurða kóki í akvavitt
í súpan eg koyri genever
til rugbreyð eg helst brúki lampuspritt
men øll míni sprittkort tað krevur
í konjakk eg seti mínar klossur á blot
í sodavatn tvái eg mítt gamla kot

7.
Ja tøkk fái Vilhelm og Katrup og Fick
og Carlsberg, Charles og hinir
takk fyri hvønn kassa hvønn tostadrykk
tit royndust sum trúgvastu vinir
men sóknarstýrið fái skomm og last
tí teir krevja skatt áðren kassin fast